## Eitt pláss aftur á FIFA-listanum

Føroyska fótbóltslandsliðið verður nú styrkismett sum nummar 166 í heiminum. Í mun til listan fyri apríl mánað, eru Føroyar yvirhálaðar av Filipinunum, sum er farið seks pláss upp eftir listanum. Landsliðsuppgávur hevur talan tó ikki verið um hendan seinasta mánaðin, og tí er styrkistalið hjá Føroyum óbroytt. Ovast á listanum er framvegis Spania, meðan Holland er nýggjur tvey´ari framman fyri Týskland, Italia, Brasil og Ongland. Sterkasta norðanlandið á listanum er Danmark, sum nú verður styrkismett sum nummar 24 av heimsins fótbóltstjóðum.



## Mai-lønin ikki goldin

Venjarar og spælarar hjá Frem, har Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen spæla, eru fangaðir í einari støðu, sum ikki er nøktandi fyri nakran. Hetta ger venjarin, Anders Theil greitt yvirfyri bold.dk: - Vit hava ikki vant síðani vit spældu dyst farna hósdag. Í morgin fara vit á fund við Spillerforeningen og Frem, og so mugu vit síggja hvat hendir, sigur Anders Theil. - Um vit spælda í Silkeborg sunnudagin, ella ikki, verður greitt í morgin, men tað er sjálvsagt, at tað er ógvuliga frustrerandi fyri meg og spælarnar. Koma boðini um, at vit skulu spæla sunnudagin, so snýr tað seg um, hvør ynskir at sleppa at spæla, og um ein bjargingarætlan er tøk. Har eru nógvir spurningar, sum skulu svarast í morgin, undirstrikar Anders Theil.

# Jan er endiliga altjóða dómari



*Hóast Jan Hentze í november í fjør hevði fingið tær sjey neyðugu undirskriftirnar, hevur hann enn ikki fingið sjálv prógvið uppá, at hann er góðkendur sum altjóða flogbóltsdómari. Men hevur hevur hann fingið at vitað, at prógvið er sent og á veg til Føroya*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**– Tað hevur tikið sína tíð at fáa neyðugu undirskriftirnar, men pappírsarbeiðið hjá altjóða flogbóltssamgonguni, FIVB, hevur gingið seint fyri seg. Men nú havi eg fingið at vita, at dómaraprógvið hjá mær er ávegis til Føroya, sigur Jan Hentze**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í hálvtfimta ár hevur Jan Hentze dømt altjóða dystir, verið á skeiðum og annars gjørt alt tað, sum gerast skal, so hann kann fáa fulla góðkenning sum altjóða flogbóltsdómari. Og nú sær út til, at hann langt um leingi er komin á mál.

– Eg havi nú frá altjóða flogbóltssamgonguni, FIVB, fingið eina váttan um, at dómaraprógvið skal vera á veg. Men mannagongdin er nokk so tung, tí eg fekk síðstu undirskriftirnar upp á pláss í november mánaði, og altjóða dómaranevndin hevði fund um góðkenningina afturi í februar, greiðir Jan frá.

– Men hóast vit nú eru komin út í juni mánað, er hetta góða prógv so ikki komið enn. Tí fór eg at ótolnast og spurdi meg fyri, og tá søgdu tey, at tað var á veg til Føroya, so eg kundi vænta mær at fáa tað fyrsta dagin. Hinvegin, so trúgvi eg ongum, fyrr enn eg havi sjálvt pappírið í hondini.

### Sjey undirskriftir

Tá tú ætlar at gerast altjóða flogbóltsdómari, skalt tú sjálvandi út at døma dystir, og hvørja ferð, tú dømir sum fyrsti dómari, skalt tú hava eina undirskrift. Tilsamans skalt tú hava sjey slíkar, harav tríggjar eru serliga týdningarmiklar.

– At fáa tær fyrstu fýra undirskriftirnar, tók ikki so langa tíð, og eg havi sjálvandi fingið fleiri ferðir fýra undirskriftir, tí eg havi jú dømt tilsamans 48 altjóða dystir. Men tað hevur tikið sína tíð at fáa fatur á teimum trimum týdningarmestu undirskriftunum, sigur Jan Hentze.

– Í altjóða dómaranevndini hjá FIVB sita sjey fólk, og tú skalt hava undirskrift frá í minsta lagi trimum av teimum, um tú skalt fáa prógv sum altjóða dómari. Og av tí at hesi fólkini eru so fá, tekur tað tíð, tí tey hava óivað einar 100-150 dystir í part at hyggja at um árið, og so ræður um at vera á rætta staðnum til rætta tíð.

Tann av limunum í nevndini, sum býr nærmast Føroyum, er ein finni, so tí var Jan fyri nakað av tíð síðani sendur til Finlands at døma ein dyst, so hann kundi fáa ta undirskriftina. Hinar báðar vóru eitt sindur verri at fáa til høldar, men í november í fjør eydnaðist endiliga at fáa pappírið fult við teimum sjey kravdu undirskriftunum.

– Tað, sum vanliga tekur einum dómara inni á europeiska meginlandinum eitt ella tvey ár, hevur tikið mær hálvtfimta ár. Og tá eg so endiliga hevði fingið alt tað formliga upp á pláss, fór eg altso at ótolnast av álvara, sigur føroyski altjóða flogbóltsdómarin.

### Fingið ábendingar

– Tá eg herfyri var á einum seminari, sum europeiska flogbóltssamgongan, CEV, skipaði fyri í bulgarska høvuðsstaðnum, Sofia, fekk eg fleiri ábendingar um, at eg helst longu var góðtikin sum altjóða dómari. Men framvegis hevði eg ikki fingið pappír uppá, at so var, so tí rykti eg FIVB eftir einum svari, sum eg nú havi fingið, sigur hann.

Ein onnur ábending um, at Jan Hentze veruliga var blivin góðtikin, fekk hann afturi í februar mánaði, beint eftir fundin í altjóða dómaranevndini, tá hann fekk tveir dystir at døma í European League-kappingini millum Bretland og Spania, sum verða spældir í Sheffield í Onglandi vikuskiftið 10. til 12. juli.

– Teir dystirnar hevði eg neyvan fingið, var eg ikki longu góðtikin, men eg havi altso framvegis ikki fingið prógvið, so henda tilgongdin krevur sanniliga gott tol. Nú er so at vóna, at eg fái góðan post ein av næstu døgunum, sigur Jan Hentze, sum í kappingini í Sheffield fer at døma sín altjóða dyst nummar 50.

# Áhugaverdar staðfestingar

**Hóast talan bert var um internan venjingardyst, so kundi Brian Kerr uttan iva gera nakrar áhugaverdar staðfestingar undir dystinum í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ikki minst mundi spenningurin kring dystin mikukvøldið snúgva seg um, hvussu nýggi landsliðsvenjarin valdi at blanda síni kort. Og um talan fór at verða um nakrar kollveltandi taktiskar broytingar á liðnum.

Kollveltingar vóru nú ikki so nógvar. Byrjunaruppstillingin var ein 4-3-3, sum meira sannlíkt eitur 4-5-1, tá mótstøðan er størri. Og fyri flestu av spælarunum var galdandi, at teir fingu ein hálvleik í part av vísa sínar dygdir.

Tó var merkisvert, at Atli Gregersen var ein av bara tveimum, sum spældi samfullar 90 minuttir av dystinum. Atli var eitt av meira óvæntaðu nøvnunum í úttøkuni, og fullir 90 minuttir kundu bent á, at venjarin vildi nýta høvið til veruliga at testa spælaran. Men hinvegin var nú avmarkað, hvussu nógv verjan fekk víst seg fram, tí fyri tað mest var trýstið móti U21-málinum.

Og eisini longur frammi á vøllinum vóru áhugaverdar staðfestingar at síggja. Ein var, at venjarin valdi at byrja við Fróða Benjaminsen, Súna Olsen og Boga Løkin á sentralu miðvallarplássunum. Tað bar við sær, at Atli Danielsen mátti byrja á beinkinum. Um hetta eisini verður støðan um eina viku, er sjálvandi upp til venjaran at gera av. Men tað var merkisvert, at hvørki Atli ella Fróði vórðu testaðir í miðverjuni. Tað varð Johan Troest Davidsen, sum spældi bæði bakkplássini, heldur ikki. Men Jónas Tór Næs sýndi sínar dygdir á høgra bakki eftir steðgin, og Johan hevur áður prógvað, at hann væl og virðiliga er førur fyri at røkja øll plássini í verjupartinum.

Tveir aðrir spælarar, sum hava verið offur fyri diskussiónum, eru Johan Ejvind R. Mouritsen og Palli Augustinussen. Báðir sluppu teir at royna seg í trý korter, men hvørgin teirra sannførdi serliga nógv um sítt kandidatur.

Johan Ejvind flutti seg tó sera væl í framrættaða spælinum, og ofta kom hann í góðar støður, men kvalitetið í avspælinum var ikki nóg góður til at skapa neyðugu møguleikarnar. Palli kom sentralt inn á miðvøllin eftir steðgin, men fyrst og fremst tóktist hann darvaður av, at hann dagliga spælir í næstbestu deildini, og tí hevði ilt við at fylgja nóg væl við leikferðini. Júst tann spurningurin varð ofta vendur, tá Óli Johannesen spældi í næstbestu deildini uttan at missa sítt landsliðspláss. Men í tí førinum visti Óli frá hópatals landsdystum, hvat kravdist til uppgávuna, og tað var eisini sjáldan – um nakrantíð – at hann dumpaði til prøvtøkuna.

Hinvegin vísti Andreas Lava Olsen, at venjarin onga orsøk hevi at seta hann í bíðistøðu, men at hann er sjálvskrivaður í kappingini um pláss í staruppstillingini. Og áhugvert var eisini at síggja, at Hjalgrím Elttør nú av álvara aftur er við í tí kappingini. Ein kapping, sum ikki verður minni, tá Símun Samuelsen eisini legst afturat landsliðshópinum.